# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tvíburðar fylla 60 ár



Í morgin, týsdagin 14. mars 2006, verða tvíburðarnir Erna Danielsen á Toftum og Ernst Lamhauge á Glyvrum 60 ár.

Foreldrini hjá teimum báðum vóru Jóhannes ella Hannebeiggi, sum hann varð nevndur, og Fryda Lamhauge á Glyvrum. Hannebeiggi var í mong ár skipari. Eitt nú førdi hann Lítlu Emmu, og eisini sigldi hann við týskum trolara. Hannebeiggi, sum var bóndasonur, var í mong ár røktingarmaður í Lamba. Sum mest sum allar aðrar konur tá í tíðini, so var Fryda heima, har hon tók sær av børnunum og fenaðinum. Tey høvdu eitt nú kúgv, seyð og høsn.

Fryda og Hannebeiggi fingu átta børn – fimm dreingir og tríggjar gentur: Andrias, Nora, Hans Jacob, Jákup, Suni, Ernst, Erna og Brynhild. Andrias flutti til Danmarkar, og Hans Jacob búði tað mesta av tíðini í Havn. Andrias og Hans Jacob doyðu í ávikavíst 1994 og 1997.

Jákup býr í Saltangará, Suni, Nora, Ernst og Brynhild búgva á Glyvrum, og Erna býr á Toftum.

Tá ið 60 ára føðingardagsbørnini fyri fyrstu ferð sóu dagsins ljós 14. mars í 1946, var pápin staddur í Havnini, har teir riggaðu til umborð á Lítlu Emmu. Henda morgunin vóru telefonboð, sum søgdu Hannebeiggja, at hann hevði fingið ein son, og at meiri var á veg. Fimm tímar seinni vóru nýggj telefonboð, sum søgdu, at nú hevði Hannebeiggi fingið eina dóttir. Tá læt í Dia í Kálvhúsinum av Glyvrum, sum stóð á dekkinum, at dagurin var so lítið liðin, at enn kundu tað koma fleiri!

Fyrstu fimm skúlaárini hjá teimum báðum vóru í Lamba, og síðani gingu tey í skúla á Glyvrum. Millum lærararnar var Karl Joensen í Lamba.

Sum flestu dreingir fyri hálvari øld síðani, so fór Ernst tíðliga til skips. Hann var bara ellivu ára gamal, tá ið hann og vinmaðurin, Jákup hjá Stinu Miu, vóru á sild við Selnes, sum Magnus undir Lymbrekku førdi. Hans Jacob (beiggi Ernst og Ernu) var bestimaður. Seinni var Ernst við Yvonnu, sum Petur í Selvindi førdi, og við Austerlitz, sum Bartal Kass førdi. Eisini sigldi hann við Havalduni, sum Dánjal Jákup Hansen á Toftum førdi.

Miðskeiðis í seksti árunum fór Ernst í handverkaralæru hjá Zachariasi Leitisstein í Runavík. Eftir at hann var avlærdur, fór Ernst á maskinmeistaraskúla í Havn, og so fór hann at sigla sum maskinmaður. Fyrst í nøkur ár við Lómi hjá Skipafelagnum, so við danska reiðarínum Kosangas, áðrenn Ernst í 1987 aftur fór at sigla við føroyskum skipum. Ernst hevur verið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, við Tjaldrinum og Ólavi Halga, og nú er hann 1. meistari umborð á Brimli.

Ernst giftist í 1973 við Sólrun, sum er dóttur Bertinu og Henning Johansen í Sandavági. Sólrun og Ernst fingu fýra børn: Hallbjørg, Fryda, Bertina og Henning. Hallbjørg og Bertina búgva í Danmark, og Henning býr á Glyvrum. Fryda var bara seytjan ára gomul, tá ið hon doyði í ferðsluvanlukku. Ernst eigur tvey abbabørn í Danmark.

Í frítíðini dámar Ernst væl at flóta. Hann er innløgumaður og tekur havhest og honum dámar væl at vera í grind. Tá ið møguleiki er fyri tí, vitja hann og konan yngru ættarliðini á flatlondum.

Eftir lokna skúlagongd á Glyvrum fór Erna til Eiðis at vera í húsinum hjá Elfrydu, sum frammanundan hevði tænt hjá Frydu á Glyvrum. Seinni arbeiddi Erna hjá Konradi Skaale í Havn, og uppaftur seinni var hon hjá Richardi Mortensen á Argjum. Tá ið flakavirkið Nykur á Toftum fór at taka ímóti fiski í 1969, taldist Erna millum flakakvinnurnar, og alt síðani hevur hon verið knýtt at virkinum. Í 2004 fekk hon gávu frá Føroya Fiskavirking fyri 35 ára trúgva tænastu.

Erna giftist í 1965 við Helga Danielsen á Nesi. Foreldrini hjá honum vóru Jóhanna og Jóhannus Danielsen (Jóhannus uppi í Forna). Erna og Helgi giftust inn á Nesi, men síðani 1970 hava tey búð á Toftum.

Tey bæði eiga fýra børn: Jóhannus, Jónfríð, Arnbjørn og Helen. Tey búgva øll í Nes kommunu. Erna eigur níggju ommubørn, og teimum dámar Erna væl at vera saman við. Hon syngur í kórinum í Fríðrikskirkjuni. Erna er rættuliga áhugað í fótbólti, og hon fylgir væl við, hvussu tað gongst B68, sum børnini og nú eisini ommubørnini hava verið og eru virkin í. Hon hjálpir til í ítróttarfelagnum, kirkjuni og missiónshúsinum, tá ið heitt verður á hana.

Tvíburðarnir fara leygardagin at halda føðingardagin saman við teirra næstu.

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Maria Nystrøm, Klaksvík**, andaðist á Landsjúkrahúsinum sunnumorgun 80 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Randi Christensen, fødd Davidsen, ættað av Sandi, búsitandi á Tvøroyri**, andaðist 12. mars á Suðuroyar Sjúkrahúsi 57 ára gomul. Jaðarferðin verður kunngjørd seinni.




## Ólavur Justinussen 70 ár



Leygardagin 11. mars fylti Ólavur Justinussen í Havn, Ólavur hjá svínoyinginum, 70 ár.

Ólavur er yngsti sonur Mariu fødd Thomsen, ættað úr Króki í Hvalba, og Søren Meinert Justinussen, oftani nevndur svínoyingurin, ættaður uppi í Húsi í Svínoy. Tey bæði giftust í 1932 og búsettust í Rabarbukvarterinum, har Ólavur eisini býr í dag. Systkini vóru 7 í tali. Eigil var elstur, hann doyði í 1974, næstur var Kjartan, hann doyði í 1982, síðani var Anna, hon doyði 2 ára gomul, tá ið Ólavur var nýføddur, so er Ólavur, síðani Anna, hon doyði í 2002 og so eru Tórhild og Ása, tær búgva á trøðni uppi við Villingadalsvegin, sum Søren Meinert í síni tíð saman við verfaðirinum breyt upp úr nýggjum.

Tá ið Ólavur var fermdur í 1950, fór hann sum messudrongur við Oyrnafjall. Oyrnafjall var í Grønlandi við útgerð, og tók ímóti fiski frá útróðrarbátum. Sjólívið hjá Ólavi varð ikki drúgt. Hann fór í snikkaralæru hjá Hartvig Hansen, og í 1956 fór hann á handverkaraskúlan í Haslev, har hann tók sveinastykkið. Hann arbeiddi síðani eitt stutt skifti í Danmark.

Heimafturkomin fór hann at smíða ymsa staðni, fyrst hjá Lamhauge og Waagstein, síðani í nógv ár hjá Hilmari Dam, og tá ið Hilmar Dam gavst, fór Ólavur saman við Haraldi Debess at smíða hús, og tað gjørdi hann, til hann gjørdist sjúkur. Ólavur er tiltikin vælgjørdur smiður.

**Dagurin í morgin**

**14. mars. Euthycius**, deyður umleið ár 740. Tikin av døgum í Mesopotaniu.